# Listaframsýning í Smiðjuni



*Tina Roesenberg (myndin) hevur saman við Randi Martin framsýning í Smiðjuni í Lítluvík*

Hósdagin 19. juli læt ein listaframsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík. Tað eru tær báðar Randi Martin og Tina Rosenberg sum sýna fram málningar og grafikk.

Saman við framsýningini verður nýggja bókin hjá Tinu Rosenberg »Mykines – Fuglenes Paradis« løgd fram og fæst til keyps.

Í bókini eru bæði myndir av málningum og nógvar litfagrar náttúrumyndir úr Mykinesi.

Framsýningin er opin til og við mikudagin 25. juli, allar dagar frá kl. 13-17.

## Føðingar

10. juli fingu Helga Rúnadóttir Øster og Jógvan Elias Jakobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 4450 gr.

11. juli fingu Alexia og Jógvan Hentze, Sørvági, ein son. Hann var 60 cm langur og vigaði 4625 gr.

12. juli fingu Durita Johansen og Jens Hjørleif Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 48 cm long og vigaði 3000 gr.

13. juli fingu Olina og Sigmar Djurhuus, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3300 gr.

15. juli fingu Rudi Heinesen og Teitur Samuelsen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3350 gr.

16. juli fingu Rúna og Hjalmar Josephsen, Klaksvík, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3250 gr.

16. juli fingu Karin Simonsen, Klaksvík, og Niels Pauli Jacobsen, Kaldbak, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3500 gr.

18. juli fingu Dagmar og Jógvan Jacobsen, Leirvík, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3950 gr.

18. juli fingu Julianna og Daniel Jacobsen Strømsten, Norðragøtu, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3710 gr.

18. juli fingu Annita Rasmussen og Jan Áki H. Olsen, Fuglafirði, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 4150 gr.

# Tørvurin framvegis stórur



*Marjun Smith saman við Metu av Fløtum, sum nú tekur við sum leiðari av Lágargarði*

**Leiðarin á røktar- og umlættingarheiminum Lágargarði seinastu 20 árini, Marjun Smith, sigur, nú hon leggur frá sær, at tørvurin á røktar- og um umlættingarplássum er framvegis líka stórur, sum tá Lágargarður læt upp í 1987**

ELDRARØKT
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í sambandi við at leiðarin á røktar- og umlættingarheiminum á Lágargarði í Havn, Marjun Smith, sum hevur verið leiðari á stovninum, síðan hann læt upp í 1987, fer úr starvi og Meta av Fløtum tekur við, hava vit spurt Marjun, hvat hon heldur um gongdina innan eldraøkið, og hvat hennara ráð eru til politisku myndugleikararnar.

Marjun Smith sigur, at hóast vit hava fingið fleiri stovnar afturat, er tørvurin á búplássun eins stórur, og hann var, tá hon byrjaði fyri 20 árum síðan. Bíðilistarnir eru framvegis langir.

Fólkatalið vaksur og harvið tørvurin. Hennara áheitan á politisku myndugleikarnar er at útvega fleiri stovnar, bæði bústovnar og stovnar til umlætting til teir ymisku tørvirnar sum t.d. tey dementu, alkoholikarar, psykist sjúku. Eisini hevur tað sera stóran týdning, at starvsfólkini hava ta útbúgving, sum svarar til tørvin hjá teimum fólkum, tey skulu arbeiða við.

Annars sigur Marjun, at hesi 20 árini á Lagargarði hevur verið ein góð tíð. Eg havi havt ógvuliga góð og dugnalig starvsfólk aftrat mær. Vit hava havt lítla útskifting av starvsfólki. Fleiri teirra hava verið her líka frá byrjan. Eisini hevur samstarvið við búfólkini og teirra avvarðandi verið gott og gevandi. Hon ynskir nýggja leiðaranum góða eydnu í starvinum.

Áðrenn Marjun kom til Havnar á Lágargarð, var hon leiðari á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi í níggju ár. Nú flytur hon aftur til Tvøroyrar at búgva.



### Prógv

Tann 16. juli 2007 varð **Anna Hansen**, Søldarfjørður, útlærd sum miðlagrafikari á Føroyaprent í Havn. Hon fekk eitt 11 tal í sveinastykkinum og skal tí niður aftur til Danmarkar tann 30. august at fáa eina bronzumedalju handaða.



### Prógv

Fríggjadagin 20. juuli fekk **Meibritt Røsvik Zisk**a progv sum lækna exam. kosmetologur og fótpleyari å Silkeborg Kosmetologskúla.